Besta úrsliti› í 13 ár

Fjór›a plássi› hjá NSÍ er besta úrslit felagsins sí›ani 1987, men høvdu B71 kent sína vitjunartí›, kundi søgan veri› ein onnur

JÁKUP MØRK

B71-NSÍ 1-2 (0-0)

Eisini í seinasta landskappingardystinum á árinum, gjørdist ta› talan um eitt tepurt tap hjá sandoyingum

B71 leg›i fyri sum eitt óløgi, tá NSÍ leygardagin var á vitjan.

Fyrsta løtan av dystinum kundi givi› fleiri mál, men í mun til vi›leikarar sínar, var Rúni Joensen í NSÍ málinum vakna›ur til tí›ina. Høvdu sandoyingar gjørt n‡tslu av hesum møguleikum, hev›i dysturin kanska fingi› eina heilt a›ra gongd, men so var ikki, og tá alt kom til stykkis, noyddust teir á heimali›num enn einafer› at taka til takkar vi› einum teprum tapi.

Sum nevnt, so vóru ta› sandoyingar, sum byrja›u betri, og fyrra helming av fyrra hálvleiki áttu teir eisini grei›a yvirvág.

NSÍ kom tó alsamt betri vi› í dystinum, tá fyrri hálvleikur var farin at halla høvdu teir so vi› og vi› arbeitt seg rættiliga inn í dystin.

Stórar málmøguleikar var tó ikki talan um, men seint í hálvleikinum kendu runavíkingar seg tó sn‡ttar fyri eitt brotsspark, tí B71 leikari n‡tti hondina í egnum brotsteigi.

Hvøkkurin, sum sandoyingar høvdu givi› gestunum í fyrra hálvleiki var helst vi›virkandi til, at NSÍ leg›i meira fyri seinna umfari›.

Ta› hjálpti eisini væl til, tá Hans Jørgen Djurhuus fekk reytt kort, eftir at hann bert hev›i veri› á vøllinum í einar fimm minuttir. Frísparki var naka› úti á vøllinum, men hetta nerva›i tó ikki Kári Hansen. Bólturin var› trilla›ur fyri føtur hansara, og úr 20 metrum høgdi hann bóltin í kassan.

Leingi var líkt til, at hetta skuldi gerast einasta máli› í dystinum, men so var› kortini ikki. Eitt sindur heppi› økti Christian Høgni Jacobsen um munin, tá skeyt av brotsteigarmarkinum.

Bólturin tók í ein verjuleikara a vegnum, so Waldemar Nowicki var› fullkomuliga sn‡ttur, og bert kundi fylgja bóltinum vi› eygunum.

B71 fekk tó eina vón naka› seinni, tá Bergleif Sólsker skeyt eitt sera gott langskot, sum helt sær nakrar sentimetrar oman fyri vøllin allan vegin í máli›, uttan at málverjin hev›i nakran sum helst møguleika at verja fyri.

Fleiri mál komu ikki í dystinum, sum sostatt enda›i vi› einum sigri til runavíkingar.

Ver›ur sæ› burtur frá føroyameistarunum úr Vági, so er NSÍ ta› li›i›, sum hevur sta›i› seg best í seinnu kappingarhálvu, har teir vunnu sjey av níggju dystum. Samanlagt rakk hetta til eitt fjór›a pláss, sum er sama endastø›a, sum felagi› hev›i í 1987.

Runavíkingar i›ra seg tó um, at ta› ikki eydna›ist at fáa fleiri stig, og sera munnu teir f‡ra dystirnir, sum vór›u taptir upp í slag í vár, sum tyngja roknskaping.

Eisini sandoyingar munnu vera á einum máli um, at teir áttu at fingi› eina betri endastø›u. Fleiri dystir eru taptir sera tepurt, og solei›is var› eisini hesu fer›.

Einki er tó at ivast í, at sandoyingar hava fólk til betri endastø›ur í komandi ári, um so er, at eingin leikari gevst í felagnum, men alt hetta eru spurningar, sum allar helst ver›a avklára›ir, tá ta› aftur fer at vára.

B71-NSÍ 1-2 (0-0)
0-1 Dánial Hansen 51
0-2 Chr. Høgni Jacobsen 80
1-2 Bergleif Sólsker 85

Dómari:
Regin Egholm (B36)

B71:
Waldemar Nowicki – Bernhard Petersen, Jón Brekku, Bergleif Sólsker – Kári Nielsen, Jógvan Jón Petersen, Julian Florescu, Bjørn Thorsteinsson – Eli Hentze, Høgni Hansen, Michael Jørgensen

NSÍ:
Rúni Joensen – Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Sjúr›ur Jacobsen – Sonni L. Petersen, Gert Langgaard, Brynjálvur Hansen, Eddie Mikkelsen – Dánjal Hansen, Christian Høgni Jacobsen.

Royn kom ov seint í gongd

Burtursæ› frá lei›slumálinum frá Milan Cimburuvic høvdu tvørámenn ikki ta› stóra at rópa hurrá fyri fríggjakvøldi›

2. deild:
Hóast seks stig frá tveimum teimum seinastu dystunum má Royn ta tungu lei› ni›ur í 3. deild. Hetta vikuskifti› lá TB eftirá á Sevm‡ri, tá grannarnir vunnu 4-1

STEFAN Í SKORINI

Sí›an ta› gjørdist greitt, at Royn skal spæla í 3. deild komandi kappingarár, hava hvalbingar fingi› fulla úrtøku burturúr teimum tveimum restandi dystunum. Um hetta kemst av, at teir nú hava slept nervunum ella ø›rum, ber bara til at gita um. Royn hevur vi› hesum víst, at ta› hóast alt ber til at fáa sigrar í hús, men teir eru komnir ov seint í gongd. Teir vóru tvey stig ov stuttir at fáa LÍF aftur á næstni›asta plássinum, og nú i›ra hvalbingar seg óiva› um onkran dyst, har ein sigur skuldi veri› fingin til høldar.

Dysturin á Sevm‡ri millum TB og Royn var› spældur fríggjakvøldi›. Hvørki av li›unum hev›i naka› at spæla um, tí TB hev›i longu tryggja› sær bronsumerkini og hev›i ongan møguleika at vinna uppá anna›plássi›. Royn hinvegin var› longu rótfest á ni›asta plássi.

TB leg›i har›ari út frá byrjan av, og tr‡sti› gav úrslit, tá eitt korter var fari›. Milan Cimburovic fekk eina sending í d‡bdina frá mi›vøllinum, og eftir eina misskiljing í verjuni hjá Royn gjørdist hann leysur. Hann lyfti bóltin uppum málverjan, sum var komin út ímóti.

Hvalbingar vildu tó ikki hava hetta sitandi á sær leingi. Á›renn hálvleik høvdu teir vent gongdini og vóru tá á odda. Útjavnandi máli› var eitt sindur heppi›. Rúni Thomsen roynir seg vi› beinlei›is frísparki, sum málverjin ikki megnar at halda, og Regin Thomsen er fyrstur og beinir bóltin inn. Næsta máli› var› skoti› av unga Gisla Sveinbjørnsson. Pól Poulsen sendi ein langan bólt fram til Gisla, sum dregur framvi› málverjanum og hev›i ongar trupulleikar frammanfyri opna málinum.

Hvalbingar vóru eins ídnir eftir einum sigri í seinna sum í fyrra umfari. Hetta var kanska eisini tann besti dysturin, sum Royn hevur spælt í øllum kappingarárinum. Bara ke›iligt, at teir ikki hava funni› naka› av hesum spælinum fram fyrr. Máli› til 3-1 avgjørdi í roynd og veru dystin. Rúni Thomsen, sum var vi› í nógvum, sendi ein langan bólt fram til Olivur Abrahamsen. Hann dróg framvi› einum verjuspælara og skeyt útifrá upp í horni›.

Tvørámenn s‡ndu lítlan vilja at vísa ordiligt spæl, tí teir vóru grei›ir yvir, at strí›i› um uppflyting var› tapt. Seinasta naglan í kistuna setti Gisli Sveinbjørnsson. Hetta var eisini ta› vakrasta máli›. Gisli royndi seg vi› høgra beini úr eini 20 metrum, og skoti› fór uppí málhorni› til endaligu stø›una 4-1.

Royn kann koma beina lei› uppaftur, men ta› krevst, at arbeitt ver›ur meira álvarsamt vi› fótbóltinum í Hvalba komandi ár. Tvørámenn hava hinvegin als ikki víst í ár, at teir hava fólki› til at venda aftur til 1. deild, har aldursforsetin óiva› heldur seg hoyra heima.

TB-Royn 1-4 (1-2)
1-0 Milan Cimburovic
1-1 Regin Thomsen
1-2 Gisli Sveinbjørnsson
1-3 Olivur Abrahamsen
1-4 Gisli Sveinbjørnsson

Sogndal má bíða eitt sindur

Allan Simonsen taldist ímillum eygnavitnini, tá Sogndal síðstu løtuna misti tvey mála leiðslu og tískil bara fekk eitt stig burturúr

Sunnukvøldið var einki serligt lag á føroyingunum í Sogndal. Fyrr um dagin høvdu teir havt vitjan av Hamarkameraterne ella HamKam, sum teir oftast verða nevndir. Í 61. minutti kom Sogndal á odda 2–0, og so bendi alt á, at tað skuldi eydnast føroyska felagnum at vinna tey trý stigini. Um teir høvdu megnað tað, so hevði tað eisini verið púra greitt, at triðja plássið – og harvið møguleikin at spæla um eitt pláss í bestu deildini – var komið til høldar. Men soleiðis skuldi tað ikki ganga.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð var føroyski landsliðsvenjarin á vitjan í Sogndal. Allan Simonsen taldist millum áskoðararnar á Fosshaugan í Sogndal sunnudagin seinnapartin.

Rógvi venur við

Í løtuni eru fýra av teimum átjan spælarunum, sum Allan Simonsen hevur sent boð eftir til landsliðsferðina til Sveis og Jugoslavia, í Sogndal. Hans Fróði Hansen, Julian Johnsson og Kurt Mørkøre vóru allir ímillum teir fyrstu ellivu sunnudagin. Hans Fróði og Julian vóru við allar 90 minuttirnar, meðan Kurt Mørkøre, sum hevði sæð gula kortið, varð skiftur út, tá tað restaðu 17 minuttir.

Rógvi Jacobsen úr KÍ fór í síðstu viku at royndarvenja í Sogndal. Sunnudagin sá hann heimadystin, og ætlanin hevur verið, at hann skuldi venja við fyrrapartin av hesi vikuni. Mikudagin fara teir fýra føroysku landsliðsspælararnir í Sogndal til Sveis.

Greitt omaná

Sogndal hevði vindin undan í 1. hálvleiki sunnudagin. Tað gekk eitt sindur striltið at fáa skipað miðvallarspælið, men í 27. minutti kom hol á. Eitt fríspark varð lagt innfyri úr átjan metrum, bólturin varð stútaður fyri føturnar á norksa U–21 landsliðsmanninum, Tommy Øren, sum sendi bóltin í málið.

Tað var fagnaður millum spælararnar, og hann gjørdist uppaftur størri, tá ein tími var farin. Tommy Øren royndi seg við skoti úr seytjan metrum, og so var mál.

Sogndal hevði fleiri aðrar møguleikar, men teir fingu ikki fleiri mál. Kurt Mørkøre var tætt við, tá eitt flatt innlegg kom innfyri úr vinstru. Norska pressan vildi vera við, at hevði skógvurin verið tvey nummur størri, so hevði Kurt megnað at stýrt tvørbóltinum í kassan. Í onkrari aðrari støðu var um reppið, at Kurt fekk mál eftir hornaspark.

Skiftisspælarar upp á spæl

Í 71. minutti minkaði HamKam um munin. Málskjútti var Daniel Novak. Hann varð skiftur inn á vøllin í 2. hálvleiki.

Í yvirtíðini javnaði HamKam til 2–2. Málskjútti var Magne Brun, sum var komin á vøllin í 2. hálvleiki.

At tað ikki eydnaðist Sogndal at fáa øll stigini var eitt stórt vónbrot. Stigatapið hevði við sær, at tað framvegis ikki er heilt greitt, um Sogndal sleppur at spæla um eitt pláss í bestu deildini. Kortini bendir alt á, at Sogndal fer at fáa henda møguleikan.

Nú verður steðgur í norsku 1. deildini fram til sunnudagin 15. oktober. Tá skal Sogndal spæla torføran útidyst í Raufoss. Í 26. og síðsta umfarinum, sum er á skránni sunnudagin 22. oktober, skal Sogndal spæla á heimavølli ímóti Kjelsås.

Kurt Mørkøre hevur fingið fimm gul kort, Hans Fróði Hansen hevur fingið fýra gul kort, og Julian Johnsson hevur fingið tvey gul kort. Felags fyri teir allar er, at teir verða leikbannaðir næstu ferð teir síggja gula kortið.

JH



Tað er framvegis ikki púra víst, um Sogndal fær triðja plássið, sum gevur atgongd til upp- og niðurflytingardyst

Málveitsla í Sarpigerði

2.deild: Við einum 8-5 sigri á KÍ slapp GÍ undan at spæla niðurflytingardyst. Heini Heinason gjørdi helvtina av málunum hjá gøtumonnum, meðan Helmar Lassen var stóri maðurin hjá KÍ

STEFAN Í SKORINI

Kravið hjá GÍ undan dystinum var ein sigur. Gøtumenn vóru á triðaftasta plássi undan dystinum og fyri at tryggja sær framhaldandi luttøku í næstbestu deildini var neyðugt við einum sigri. Hesum fóru gøtumenn eftir, og tað eydnaðist eisini at vinna í málríkasta dystinum í deildini í ár.

KÍ hevur verið flúgvandi í seinnu hálvu av landskappingini, men í hesum dystinum tóktist tað ikki sum at klaksvíkingar vóru serliga uppsettir at fáa trý stig til høldar. KÍ var niðast, tá kappingin var hálvrunnin, men teir hava nú tikið seg upp á fimta pláss. B36 fór tó framvið KÍ eftir seinasta umfarið.

Málini rullaðu inn í stríðum streymi heilt frá byrjan av. Longu tá tveir minuttir vórðu spældir legði Dánjal Pauli Dalbø GÍ framum. Helmar Lassen javnaði tríggjar minuttir seinni, men Erland Tvørfoss, sum fekk fatur á einum útspæli frá málverjanum hjá KÍ, og Heini Heinason løgdu gøtumenn framum 3-1, áðrenn Helmar Lassen aftur var uppá spæl og minkaði um munin til 3-2 beint fyri steðgin.

Heini Heinason skoraði til 4-2, meðan Helmar Lassen minkaði til 4-3 í teimum fyrstu minuttunum eftir steðgin. Bróðir Heina, Bárður Heinason, fekk fimta málið hjá gøtumonnum, men Fríðin Ziskason minkaði aftur við brotssparki. Veteranurin Símun Petur Justinussen slapp eisini uppí part. Hann skoraði eisini frá brotssparkblettinum. GÍ dróg síðani frá klaksvíkingum, tá Heini gjørdi tað til 7-4. Helmar svaraði aftur og skoraði til 7-5, og Heini Heinason sló sigurin fastan við seinasta málinum.

Fótbóltsliga virði var lítið, og tað sást á øllum brøgdum, at menn ikki vóru serliga væl upplagdir. Verjuspælið var út av lagi vánaligt í fleiri førum, og tað hevði ein stóran leiklut í teimum nógvu málunum.

GÍ bjargaði sær tó í seinasta dystinum, og teir verða sostatt at síggja aftur í næsta ár. KÍ fekk ikki ein heiðurligan enda á eini sera væl eydnaðari seinnu hálvu, men teir hava kanska verið tað mest sannførandi liðið saman við EB/Streymi eftir summarfrítíðina.

GÍ-KÍ 8-5 (3-2)
1-0: Dánjal Petur Dalbø
1-1: Helmar Lassen
2-1: Erland Tvørfoss
3-1: Heini Heinason
3-2: Helmar Lassen
4-2: Heini Heinason
4-3: Helmar Lassen
5-3: Bárður Heinason
5-4: Fríðin Ziskason
6-4: Símun Petur Justinussen
7-4: Heini Heinason
7-5: Helmar Lassen
8-5: Heini Heinason

Kassadystur

Fíggjarliga úrtøkan hjá B36 var betri enn tann ítróttarliga

JÁKUP MØRK

Um ikki annað, so kunnu tey í B36 vera nøgd við peningaligu úrtøkuna av dystinum leygardagin.

Tilsamans vórðu umleið 2.150 atgongumerki seld, so hóast vágbingar einki stig lótu eftir sær, so sótu tey í B36 ikki heilt við ongum, tá dysturin var lokin.

Tá KÍ í fjør vitjaði í næst seinasta umfarinum, vóru á leið 2.600 gjaldandi áskoðarar, men kassameistarin hjá B36, Kjartan Mohr, roknaði við, at tað kortini vóru fleiri áskoðarar til dystin leygardagin, enn tað vóru í fjør.

Per Joensen og Gunnar Reynslág sita her eftir dystin og telja upp pengarnar fyri seldu atgongumerkini